

## PD breiðir seg í Noregi

Sjúkan í norsku alivinnuni, sum verður rópt PD, sigst vera verri enn ILA. Lutfalsliga nýggja sjúkan, sum er staðfest í norsku alivinnuni, smittar verri enn ILA. Fiskur, sum verður fongdur við PD, gerst verri til dygdar. Sjúkan hevur breitt seg spakuliga í norsku alivinnuni, og røtt hevur verið um, hvussu smittan breiðir seg. Tað eru tey, sum halda upp á, at sjúkan bæði breiðir seg frá alibrúkum til alibrúk – og við rognum, men lítil ivi er um, at PD ikki vanliga smittar við rognum. Á aliráðstevnuni verður framløga um hesa sjúku, og hvussu granskari heldur, at hon breiðir seg.

# Tað er avgjørt áhugavert at granskað verður í alivinnuni



**- Eitt sera áhugavert øki, sum vit kundu hugsað okkum, at granskarar fóru at kanna, er, hvussu tað kann umgangast, at alifiskur gerst so strongdur undir slátri. Strongdin ger, at fiskurin gerst verri, tá hann liggur hjá keyparanum, sigur Ragnar Joensen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag**

ALIGRANSKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í aðrari grein í hesum innleggsblaði um aling og onnur viðurskifti í sambandi við aling, verður greitt frá visjónunum, sum Fiskaaling hevur sett sær, nú stovnurin er farin at leggja størri dent á gransking innan alivinnu.

Eitt av økjunum, sum felagið hevur sett sær fyri at granska í, er í matvørugóðskuni á aldum fisk og í aling á streymasjógvi.

Fleiri onnur áhugaverd øki eru eisini nevnd í visjónunum, sum Fiskaaling hevur sett út í kortið, eitt nú sjúkufyribyrging, fiskaheilsu og aliumhvørvi.

Formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag, Ragnar Joensen, heldur, at visjónirnar hjá Fiskaaling eru rættiliga áhugaverdar.

– Fiskaaling varð í sínari tíð sett á stovn til tess at fáa aling í gongd, og seinni fór felagið eisini undir rognaframleiðslu og gjørdust einaumboð í Føroyum fyri rognum. Í 2001 varð lógin um rogn broytt, soleiðis at alarar nú fingu loyvi til at innflyta rogn úr útlandinum. Fá ár eftir hetta vóru teir fyri óhappi á Lívfiskastøðini í Skopun, og tá byrjaðu alarar at keypa rogn úr útlandinum.

Ragnar vísir á, at Fiskaaling eisini hevur verið í fíggjarligum trupulleikum, soleiðis at játtanin ikki rakk til tað kynsbótaarbeiði, sum fór fram í Skopun.

### Granskingardepil

– Nú verður so nýggi leik-



*- Alarar kundu hugsað sær, at sláturvirksemið bleiv optimerað við tí fyri eyga at minka um strongdina, so fiskurin heldur sær longri á marknaðinum, sigur Ragnar Joensen*